# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 08-03-2024

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## at skipa fiskiskapin hjá bretskum skipum í føroyskum sjógvi í 2024

Við heimild í § 25, stk. 4, § 26, stk. 2, § 34, stk. 1, nr. 1-4 og 6, stk. 2, nr. 2 og 4 og stk. 3 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023, verður ásett:

### Kapittul 1
### Virkisøki

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um fiskiskap eftir botnfiski í føroyskum sjógvi í 2024 við bretskum skipum samsvarandi sínámillum fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Sameinda Kongsdømið Stórabretland og Norðurírland.

### Kapittul 2
### Fiskiskapur eftir botnfiski

**§ 2.** Loyvt er bretskum skipum at royna í føroyskum sjógvi eftir hesum botnfiskasløgum og nøgdum í 2024:
1) Toskur og hýsa: 920 tons tilsamans, harav í mesta lagi 276 tons av toski.
2) Upsi: 600 tons.
3) Kongafiskur: 10 tons.
4) Blálonga og longa: 180 tons tilsamans.
5) Flatfiskur: 40 tons.
6) Onnur fiskasløg: 475 tons.

*Stk. 2.* Loyvt er bert at veiða tosk sum hjáveiða.

**§ 3.** Veiða av fiskasløgunum sambært § 2, nr. 1-5 verður mótroknað í kvotunum av hesum fiskasløgum uttan mun til, um talan er um beinleiðis veiðu ella hjáveiðu. Veiða av øðrum fiskasløgum, enn teimum í § 2, nr. 1-5, verður mótroknað í kvotuni av øðrum fiskasløgum sambært § 2, nr. 6.

*Reiðskapur*

**§ 4.** Fiskiskapurin sambært § 2 kann fara fram við troli og línu.

*Stk. 2.* Veiða við bummtroli og við uppsjóvartroli er ikki loyvd. Loyvt er bert at royna við einum troli í senn.

**§ 5.** Í fiskiskapi eftir botnfiski er ikki loyvt at nýta trol, sum í nøkrum parti hevur smærri meskar enn 145 mm, samanber tó §§ 6 og 7.

*Stk. 2.* Tvørmátið á tráðnum í trolposanum, 8 teir aftastu metrarnar av trolinum, eigur ikki at fara upp um 8 mm. Netið framman fyri posan, millumstykkið, skal ikki vaksa í ummáli úr forkanti í afturkant, og pláturnar í yvirpartinum og undirpartinum skulu vera eins. Meskarnir í hvørjari plátu

skulu vera skornir eftir síðu og ikki í nøkrum føri eftir leggi. Posin skal vera úr rektangulerum plátum, har yvirpláturnar og undirpláturnar eru eins. Ummálið í forkanti á posanum skal ikki vera víðari enn afturkanturin á millumstykkinum. Loyvt er at sneiða 3 teir aftastu meskarnar inneftir.
*Stk. 3.* Tað er ikki loyvt at snøra posan ella á nakran hátt at bera so í bandi, at meskarnir ikki standa fult mát. Tó er loyvt:
1) at knýta tilfar, ið bara verður fest framman og á síðurnar á undirsíðuna av trolposanum fyri at minka um slit, og
2) at lata festið til gjørðina ganga gjøgnum spellið og møguliga vera fest í spellið, tó soleiðis, at spellið ikki liggur fast at posanum av hesi orsøk.

*Stk. 4.* Tað er ikki loyvt at brúka gjarðir, rundstroppar, tó er loyvt at hava eina gjørð, lyftistropp, í posanum til at býta sundur við. Gjørðin skal ikki vera styttri enn 70% av ummáli trolposans, mált við strektum meski tvørturum á posanum á tí staðnum, har gjørðin er fest til posan.

*Serligar ásetingar fyri beinleiðis veiðu eftir upsa*

**§ 6.** Hóast ásetingarnar í § 5, stk. 1-4 er í beinleiðis veiðu eftir upsa loyvt at nýta trol við meskum niður í 135 mm, ið kann vera í mesta lagi 8 teir aftastu metrarnir.
*Stk. 2.* Skip skulu boða Vørn frá á vakt@vorn.fo, tá ið tey byrja og enda fiskiskap sambært undantaksreglum í stk. 1, eisini tá lagt verður um til annan fiskiskap.
*Stk. 3.* Beinleiðis veiða eftir upsa er veiða, har upsi er í minsta lagi 50% av vektini í hvørjum háli.

*Serligar ásetingar fyri beinleiðis veiðu eftir blálongu*

**§ 7.** Hóast ásetingarnar í § 5, stk. 1-4 er í beinleiðis veiðu eftir blálongu loyvt at nýta trol við meskum ikki smærri enn 100 mm í posanum, ið kann vera í mesta lagi 22 m til longdar, og 135 mm í restini av trolinum á leiðum sunnan fyri 61°45,000 N og vestan fyri 009°00,000 V, og økið sunnan og vestan fyri eina linju millum staðfestingarnar 60°30,000 N, 007˚00,000 V og 60˚00,000 N, 06°00,000 V.
*Stk. 2.* Skip skulu boða Vørn frá á vakt@vorn.fo, tá ið tey byrja og enda fiskiskap sambært undantaksreglunum í stk. 1, eisini tá lagt verður um til annan fiskiskap.
*Stk. 3.* Beinleiðis veiða eftir blálongu er veiða, har blálonga er í minsta lagi 50% av vektini í hvørjum háli.
*Stk. 4.* Beinleiðis fiskiskapur eftir blálongu skal ikki rekast á grynri sjógvi enn 500 m.

**§ 8.** Um fiskifør, sum fiska eftir undantaksreglunum sambært §§ 6 og 7, hava størri enn 50% íbland av øðrum fiskasløgum, skal fráboðan sendast Vørn á vakt@vorn.fo, og fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum skal steðga beinanvegin.

*Máting av meskum og merking av reiðskapi*

**§ 9.** Meskavíddin skal vera soleiðis, at tá ið meskurin verður strektur á vátum neti diagonalt eftir longdini, skal flatt mátitól, 2 mm tjúkt, við tí ásetta mátinum lættliga ganga gjøgnum meskarnar í netinum sambært starvsreglugerð um meskamáting.
*Stk. 2.* Fiskireiðskapur, ið ikki stendur mát sambært §§ 5-7, skal vera fyri seg í serligum rúmi ætlað til goymslu av hesum reiðskapi.
*Stk. 3.* Allar boyur á línureiðskapi skulu vera merktar við kallibókstavunum og havnarkenningarnummarinum hjá fiskifarinum. Allar endaboyur skulu hava eina minst 1,5 metur høga stongboyu við vimpli við havnarkenningarnummari.

*Skiljirist*

**§ 10.** Fiskifør, sum fiska sambært hesi kunngerð, skulu halda seg til ásetingarnar um skiljirist sambært kunngerð um

skiljirist í sambandi við fiskiskap við botntroli í føroyskum sjógvi.

## Kapittul 3
## Ymiskar ásetingar

*Leiðir*

**§ 11.** Fiskiskapur sambært hesi kunngerð kann fara fram í føroyskum sjógvi í ICES-øki 5b, tó ikki á Føroyabanka.

*Friðaðar leiðir*

**§ 12.** Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihátti innan fyri linjur drignar 12 fjórðingar úr grundlinjunum.
*Stk. 2.* Fiskifør, sum fiska sambært hesi kunngerð, skulu halda seg til ásetingarnar um friðað øki ásettar í kunngerð um at friða ávísar leiðir í føroyskum sjógvi fyri veiðu við troli og øðrum reiðskapi og til ásetingarnar í kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum.

*Loyvi*

**§ 13.** Fiskifør undir bretskum flaggi kunnu bert byrja fiskiskap á føroysku landleiðunum, um tey eru á lista yvir fiskifør, sum Bretland hevur givið loyvi at fiska á føroysku landleiðunum sambært hesi kunngerð. Listin skal vera fráboðaður og góðkendur av føroyskum myndugleikum. Á listanum skal vera frámerkt, hvat fiskaslag fiskifarið hevur loyvi at fara til beinleiðis fiskiskap eftir.

*Ungfiskur*

**§ 14.** Fiskifør, sum fiska sambært hesi kunngerð, skulu halda seg til ásetingarnar um ungfisk ásettar í kunngerð um vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski.

*Minstamát á fiski*

**§ 15.** Fiskur, ið ikki stendur hesi mát, mátaður fremst úr høvdinum til aftast á stertinum, er undirmálsfiskur:
1) Toskur, Gadus morhua, 40 cm.
2) Hýsa, Melanogrammus aeglefinus, 37 cm.
3) Reyðsprøka, Pleuronectes platessa, 40 cm.
4) Lálla, Glyptocephalus cynoglossus, 28 cm.
5) Tunga, Microstomus kitt, 30 cm.
6) Kalvi, Hippoglossus hippoglossus, 45 cm.
7) Sild, Clupea harengus, 22 cm.
8) Glaskvoysa, Lepidorhobmus whifflagonis, 25 cm.
9) Laksur, Salmo salar, 60 cm.
10) Hvítingur, Merlangius merlangus, 30 cm.
11) Stórur kongafiskur, Sebastes marinus, 30 cm.
12) Trantkongafiskur, Sebastes mentella, 30 cm.
13) Blálonga, Molva dipterygia, 60 cm.
14) Longa, Molva molva, 60 cm.
15) Brosma, Brosme brosme, 40 cm.
16) Langasporl, Coryphaenoides rupestris, 40 cm.
17) Gulllaksur, Argentina silus, 28 cm.
18) Havtaska, Lophius piscatorius, 50 cm.
19) Upsi, Pollachius virens, 45 cm.
20) Svartkalvi, Rheinhardtius hippoglossoides, 35 cm.
21) Makrelur, Scomber Scombrus, 30 cm.

*Stk. 2.* Veiðan av undirmálsfiski fyri hvønn túr skal ikki vera meir enn 5% av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin. Tó kann veiðan av undirmálsmakreli vera upp í 10% av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin.

*Umrokningarfaktorar*

**§ 16.** Við umrokning av fiski og fiskavørum til runda vekt verða ásetingarnar í kunngerð um umrokningarfaktorar nýttar.

*Fiskireiðskapur*

**§ 17.** Kemur skip inn á øki, har tað ikki hevur loyvi at fiska, skal allur fiskireiðskapur vera burturstúgvaður á sínum natúrliga staði og trolwirar úrsjekladir.

*Umskipingar*

**§ 18.** Sambært § 26, stk. 1 í løgtingslógini er umskiping av veiðu ikki loyvd.
*Stk. 2.* Vørn kann tó loyva umskiping við bryggju í føroyskari havn samsvarandi galdandi NEAFC-reglum hesum viðvíkjandi.

*Fráboðanarskyldur*

**§ 19.** Skip undir bretskum flaggi, sum sambært § 13 hava loyvi at fiska á føroysku landleiðunum, skulu senda fráboðan til Vørn, sum nærri ásett í skjali 1 til hesa kunngerð.

*Eygleiðari*

**§ 20.** Vørn ger av, um eygleiðari skal vera umborð á fiskiførum, ið fiska sambært hesi kunngerð. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerðina umborð til tess at hava samband við Vørn og við aðrar myndugleikar.

## Kapittul 4
## Revsireglur og gildiskoma

*Revsing*

**§ 21.** Brot á §§ 4-9, 11-13, § 15, stk. 2, §§ 17 og 19 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki boðar frá sambært § 8 ella forðar Vørn í at útinna sínar uppgávur sambært § 20.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 3.* Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildistíð*

**§ 22.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2025.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, xx. mars 2024

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen

**Skjal 1**

## Fráboðanir til Vørn

Niðan fyri standandi fráboðanir skulu sendast til vakt@vorn.fo.

**1) COE - Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í føroyskt fiskiøki.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| Dataelement | Koda | Frágreiðing |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | COE, fráboðan um, at fiskiskapur byrjar (Catch on Entry) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi (ikki krav) |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða er eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (ikki krav) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum (ikki krav) |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið hagar skipið fer til fiskiskap |
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða umborð | OB | Veiða umborð flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu. Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24M h:m) |
| Viðmerkingar | RE | Viðmerkingar |

**2) CAT – Veiðifráboðan hvønn dag. Fráboðanin skal sendast, hóast eingin veiða er fingin. Skal sendast dagliga fyrrapartin áðrenn kl. 12 UTC.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| Dataelement | Koda | Frágreiðing |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | CAT, veiðifráboðan (Daily Catch report) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi (ikki krav) |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða er eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (ikki krav) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum (ikki krav) |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið har skipið er til fiskiskap |

| | | |
|---|---|---|
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða | CA | Veiða undanfarna samdøgur frá 00.00 til 23.59 (CAT), flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |
| Samlað veiða umborð | TC | Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg. |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m) |
| Viðmerkingar | RE | Viðmerkingar |

**3) COX – Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Skal sendast, í fyrsta lagi 8 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið skiftir frá einum fiskaslagi til eitt annað ella gevst at fiska. Verður farið úr føroyskum sjógvi, skal fráboðanin sendast í seinasta lagi 12 tímar áðrenn.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| **Dataelement** | **Koda** | **Frágreiðing** |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | COX, fráboðan, at fiskiskapur endar (Catch on Exit) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi (ikki krav) |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða hevur verið eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (ikki krav) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum (ikki krav) |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið hvaðani skipið kemur av fiskiskapi |
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða | CA | Veiða, fiskað undanfarna samdøgur frá 00.00-23.59, flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |
| Samlað veiða umborð | TC | Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg. |
| Móttøkuhavn | PO | Havn har fiskurin verður uppskipaður/umskipaður |
| Landað ella umskipað | TR | Upplýs hvat virki ella skip veiðan verður landað ella umskipað til. |
| Dagur, tá veiðan verður landað ella umskipað | PD | Dagurin, tá mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð har veiðan verður landað ella umskipað | PT | Tíð á degnum mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (24H h:m) |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m) |
| Viðmerking | RE | Viðmerking |